## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag – Skírhósdag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi, men hann minkar vindin móti kvøldi. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið Langa Fríggjadag:**
Lot til andøvsgul av suðri og regn av og á. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og landsynningi og sum fráliður regn. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið Páskadag og 2. Páskadag:**
Fyrrapart Páskadag upp í strúk av landsynnigi og regn, men seinnapartin minni vindur og sólglottar, tó okkurt ælið. Hitin millum 5 og 7 stig. 2. Páskadag andøvsgul av útsynningi og ælingur, partvís vátakavi, men eisini sólglottar. Hitin millum 1 og 4 stig.

# IRF hevur stóran fíggjarligan tørv

**Øktu umhvørviskrøvini og stóra skuldarbyrðan teljast millum fremstu orsøkirnar til, at IRF innan tey næstu átta árini hevur stóran tørv á fíggjarligum betringum. IRF hevur gjørt eina langtíðarætlan, sum staðfestir stóra íløgutørvin, og neyðugt verður við hjálp frá landsstýrinum**

**BRENNISTØÐ**
*Heri á Rógvi*

– Stóra skuldin, vaksandi rakstrarútreiðslurnar og ein íløgutørvur komandi 8 árini, sum kemur at tátta í 200 mió. kr. ger, at framtíðarstøðuna sera trupla, um ikki inntøkugrundarlagið verður broytt munandi komandi árini.
Hetta stendur at lesa millum fyrstu síðurnar í ársroknskapinum og ársfrágreiðingini hjá IRF(Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin).

Ársúrslitð hjá IRF var annars ikki nakað vánaligt úrslit. Úrslitið vísti eitt yvirskot áljóðandi 4,4 mió kr. Orsakað av støðuni hjá IRF sum lutafelag, so skal tað ikki gjalda skatt, og yvirskotið fer beint inn hjá felagnum. Tað eru flestu kommunurnar í landinum, uttan tær í høv-uðsstaðarøkinum, sum eiga IRF. 28.650 borgarar eru umboðaðir í IRF gjøgnum sína einstaku kommunu. Felagsskapurin varð settur á stovn í 1979 og í 1989 varð høllin liðug í Lorvík.

### Langtíðarætlan

Henda sama høllin, sum stóð liðug í 1989, fekk eisini tá ein spildurnýggjan ovn, men hesin er ikki longur spidurnýggjur. Í 2008 skal hesin skiftast út, og hetta er ein íløga upp á einar 90 mió. kr.

Poul Andrias Joensen, stjóri fyri IRF, sigur, at teir hava merkt, at krøvini frá myndugleikunum við atliti at umhvørvinum eru vorðin munandi strangari. Millum annað nevni Poul Andrias, at teir hava fingið álagt at fáa sær eina nýggja roykreinsingarskipan innan 2005, og hendan fer at kosta um 30 mió kr. Alt hetta gevur eina samanlagdan tørv á umleið 200 mió. kr. næstu átta árini.

Til tess at fremja hesa íløgur og broytingar í verki, so IRF hava fatur á fleiri inntøkum. Ein ætlan er at umleggja stóra lánið frá landsstýrinum til eitt stuðulslán, men einki endaligt svar er komið um hetta. Eisini er ætlanir um eitt punktgjald á ávísum burturkasti. Hvussu er og ikki, so liggur bólturin nú hjá landsins myndugleikum, tí kommunar megna neyvan ein so stóra íløguútreiðslu.



*Tað verður dýrt at halda IRF koyrandi næstu átta árini. Einar tveyhundrað milliónir skulu til*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷13 |
| Nuuk | ÷4 |
| Qaqortoq | ÷3 |
| Ammassalik | 1 |
| Saint John's | ÷4 |
| Halifax | 0 |
| Reykjavík | 1 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 10 |
| London | 11 |
| Tromsø | 4 |
| Bergen | 6 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 7 |
| Keypmannah. | 5 |
| Helsinki | 6 |
| Moskva | 5 |
| Berlin | 1 |
| Warzawa | 3 |
| Kiev | 6 |
| Bukarest | 8 |
| Paris | 10 |
| Madrid | 15 |
| Róm | 14 |
| Malorca | 19 |
| Athen | – |
| Malta | 14 |
| Tunis | 17 |
| Beijing | 16 |
| New Dehli | 29 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | – |
| New York | 4 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 23 |
| Panama | 33 |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 20 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 979 hPa. í útsynning úr Íslandi fer í landnyrðing. Hátrýstið, 1034 hPa. yvir Bretlandi og Norður-Týsklandi stendur mestsum í stað.




Eitt brúgvalag frá Vestur-Noreg til Azorurnar stendur mestsum í stað, men á tí tekur eitt lágtrýst seg upp og verður væntandi við Føroyar leygarkvøldið.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 26/03 kl. 06[00]– 27/03 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 7,1°
Minsti hiti máldur í mars: ÷8,7° Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 12,0 mm – mált frá 26/03 kl. 06[00]– 27/03 kl. 06[00]
Avfallið higartil í mars: 53,4 mm




BILLUTIR
ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666

## VESTFALLSKYRRINDI

28. mars: Fullmáni/Mánin næstur jørðini

| Dagur | Suðuroyar—/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar—/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna—sundi fp. | sp. | Mykines—firði fp. | sp. | Nólsoyar—firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar—/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna—sundi fp. | sp. | Fugloyar—firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 28. mar | 06.04 | 18.27 | 05.04 | 17.27 | 05.19 | 17.42 | 08.04 | 20.27 | 09.04 | 21.27 | 04.19 | 16.42 | 03.19 | 15.42 | 06.19 | 18.42 | 07.19 | 19.42 | 05.49 | 18.12 | 07.04 | 19.27 |
| 29. mar | 06.51 | 19.16 | 05.51 | 18.16 | 06.06 | 18.31 | 08.51 | 21.16 | 09.51 | 22.16 | 05.06 | 17.31 | 04.06 | 16.31 | 07.06 | 19.31 | 08.06 | 20.31 | 06.36 | 19.01 | 07.51 | 20.16 |
| 30. mar | 07.42 | 20.07 | 06.42 | 19.07 | 06.57 | 19.22 | 09.42 | 22.07 | 10.42 | 23.07 | 05.57 | 18.22 | 04.57 | 17.22 | 07.57 | 20.22 | 08.57 | 21.22 | 07.27 | 19.52 | 08.42 | 21.07 |
| 31. mar | 09.32 | 21.58 | 08.32 | 20.58 | 08.47 | 21.13 | 11.32 | 23.58 | — | 12.32 | 07.47 | 20.13 | 06.47 | 19.13 | 09.47 | 22.13 | 10.47 | 23.13 | 09.17 | 21.43 | 10.32 | 22.58 |

Kelda. Álmanakkin 2002

5 707265 100043 >